# Býráðsskrivstovan í summarfrítíðini

Nú flestu starvsfólk fara í summarfrí, fer býráðsumsitingin í tíðarskeiðinum:

**12. juli-13. august 2004**

**bert at avgreiða tey mest neyðugu og átrokandi málini.**

**Telefon- og upplatingartíðirnar** eru hvønn gerandisdag millum:

**kl. 10.00-16.00.**

# Summarsteðgur

## hjá nevndum og býráði

Í juli og august er summarsteðgur í teimum regluligum nevndar- og býráðsfundunum.

**Næsta nevndarumfar** eftir summarsteðgin verður

**í september mánað,**

**og mál, sum ynskjast viðgjørd** á hesum fundum, skulu vera býráðsumsitingini í hendi í seinasta lagi

**23. august 2004.**

**Klaksvíkar Býráð**
Nólsoyar Pálsgøta 32 · Postsmoga 2
FO-700 Klaksvík
Tlf. 41 00 00 · Fax 41 00 01

# Føroya Heimavirkisfelag

## Eykaaðalfundur 17. juni 2004 kl. 20.00

Boðað verður til eykaaðalfundar í hølum felagsins í J. Paturssonargøtu 24, Tórshavn, hósdagin 17. juni kl. 20.00 við hesi skrá:

1. Val av fundarstjóra og skrivara
2. Viðtaka soljóðandi nýtt 5. stk. í § 4 og nýtt 4. stk. í § 5:
   *»Um fundurin ikki er viðtøkuførur, kann eykaaðalfundur verða 1/2 tíma seinni.«,*
   ið fekk neyðugu 2/3 av greiddum atkvøðum á ikki viðtøkuføra eykaaðalfundinum 9. juni 2004.
3. Ymiskt.

**Nevndin**

Sosialurin
-tað loysir seg

# Fuglafjarðar skúli

Hesi størv eru leys at søkja fyri skúlaárið 2004/05.

- **4 lærarastørv** fyrilærarar í farloyvi
- **1 lærarastarv** 19 t/v fyri lærarar við niðursettum tímatali
- **1 starv** sum sergreinalærari 6 t/v at undirvísa í motorlæru

Størvini, ið eru tíðaravmarkað skúlaárið 2004/05, verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

- **1 starv** sum stuðul 19 t/v.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 444087 ella 214087.

Umsóknir skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 21. juni kl. 10.00.**

**Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum!**

**Fuglafjarðar skúlastýri**
**v/ Una Næs**
**FO-530 Fuglafjørður**

## Starvsfólk til P/F Wenzel

P/F Wenzel søkir starvsfólk til klárgerðing/reingerðing av nýggjum og brúktum bilum.

Annað fyrifallandi arbeiði, so sum dekkskift, oljuskift o.a. hoyrir eisini til.

Viðkomandi má hava koyrikort til persónbil.

Rætti viðkomandi fær fast starv, og arbeiðstíðin er mánadag - fríggjadag frá kl. 08.00 til 16.10.

Løn sambært avtalu við felagið.

Umsóknir kunnu sendast til:

Ford

**P/F Wenzel • Akranesgøta 5**
**Postboks 3043 • 110 Tórshavn**
**Att: Bilasølan**

# Skotskar/-hollenskar kýr

**til sølu frá Danmark.**

Kýr við kálvi, neyt og nakrir tarvar eru til sølu.

Setið tykkum í samband viðokkum og fái eitt tilboð.

**Elen og Jørn Ohre**
**0045 75267291 ella 0045 40167291**
www.agervigcattle.dk
mail: sales@agervigcattle.dk

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3796
**Navn:** Sp/f JBJ Bygging
**Adressa:** Oman Stóragarð 9, 100 Tórshavn

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 27.05.2004
**Viðtøkudato:** 27.05.2004
**Kapitalur:** Kr. 81.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 81.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnarar:** Jón Suni Christiansen, 350 Vestmanna, Johan Joensen, Undir Heygnum 29, 100 Tórshavn og Bjarni Mohr Arnason, Oman Stóragarð 9, 100 Tórshavn.
**Nevnd:** Jón Suni Christiansen, 350 Vestmanna (formaður), Johan Joensen, Undir Heygnum 29, 100 Tórshavn og Bjarni Mohr Arnason, Oman Stóragarð 9, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Johan Joensen, Undir Heygnum 29, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra,nevndarformanni, einum nevndarlimi ella allari nevndini í felag.
**Grannskoðari:** Grannskoðaravirkið Hermund Jacobsen, J. Broncksgøta 16, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 27.05.2004 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka húsasmíð og annað starv í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya*
*tann 10. juni 2004*
*Kristin Balle*

veitst tú ikki tað?

# Til sølu



Bátur við vogni til sølu um hóskandi boð fæst.

**Áhugað ringið til 218302**

# Bilar til sølu

### Opel Vectra 1.6 bensin st.car persónbilur



· Árgangur 2001 · Km 46.045
· Airconditon, radio, bagaguskjúlara, takboylar · Vælhildin

*prísur* **158.500,-**

### Ford Escort 16V



· Árgangur 1995 · Km 128.103
· Krók, stereoanlegg · Nýlakkeraður

*prísur* **58.000,-**

### Citroen Xsara diesel



· Árgangur nov 2001 · Km 30.000
· El-rútar, hita í setrum, aircondition, fjarstýrt centrallás, góð summardekk, góð píkadekk á felgum fylgja við · Vælhildin

*prísur* **135.000,-**

### KIA Clarus 2.0 bensin



· Árgangur jul 1997 · Km 125.000
· El-rútar framman, fjarstýrt centrallás, Pioneer anlegg, sportfelgur við góðum summardekkum, góð píkadekk fylgja við · Vælhildin

*prísur* **85.000,-**

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tel 31 10 13 · Fartel 51 10 13
Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com





## Fyri ein av okkara kundum, sum er eitt framleiðsluvirki, søkja vit eftir stjóra

**Tað verður roknað við at tú, umframt at hava góð samstarvsevnir, hevur:**
- royndir innan søluarbeiði
- royndir innan leiðslu og planlegging
- teldukunnleika á brúkarastøði
- íbirtingarhug og - evnir

Tað er neyðugt at tú hevur koyrikort til bil.

Løn eftir avtalu.

Er hettar nakað fyri teg, so halt teg ikki aftur, men send okkum eina skrivliga umsókn, saman við evt. viðmælum, innan fríggjadagin tann 18. juni 2004, til:

**Sp/f Grannskoðaravirkið**
**Hermund Jacobsen**
**skrásettur grannskoðari**
**boks 16 - 110 Tórshavn**
**teldupostur: hermund@hermund.fo**

SP/F GRANNSKOÐARAVIRKIÐ
HERMUND JACOBSEN
SKRÁSETTIR GRANNSKOÐARAR

# Barsilsavloysari til Marknaðardeildina

Av tí at eitt av okkara starvsfólkum fer í barsil, sóknast vit eftir einum avloysara til at taka sær av starvinum fyribils í eitt ár.

Tú hevur góð skapandi evnir, og tú dugir at loysa skiftandi og fjølbroyttar uppgávur. Harumframt hevur tú kunnleika til marknaðarføring og sølu. Tú ert ein royndur brúkari av Amadeus og øllum teimum vanligu telduforritunum og hevur góðan málkunnleika. Í sambandi við arbeiði kemur tú eisini at ferðast uttanlands.

Send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum. Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. juni, og starvið verður sett skjótast gjørligt.

Lønin verður eftir avtalu.

Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kent Christensen á tlf. 34 10 40.

Atlantic Airways
Sølu- og Marknaðardeildin
FO-380 Sørvágur

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo

# Lívbjargari

## til Klaksvíkar Svimjihøll

Í sambandi við at ein av okkara lívbjargarum fer frá vegna aldur, verður søkt eftir mannligum lívbjargara til svimjihøllina í Klaksvík.

Umframt at arbeiða sum lívbjargari, fevnir starvið um at taka eina hond í ymiskt í tí dagliga.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal vera góður svimjari og hava lívbjargaraoryndina. Skipað kann eisini verða fyri lívbjargararoynd í sambandi við setan.

**Setanarviðurskifti:**
Talan er um eitt fulltíðarstarv, sum er skipað í vaktir.
Ætlanin er at seta starvið í seinasta lagi 1. oktober. 2004.
Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Kára Kjelnæs svimjihallarleiðara, telefon 21 97 12.

**Umsókn**
viðmerkt »lívbjargari« saman við heilsuváttan, møguligum viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir, skal vera Klaksvíkar kommunu, Postboks 2, 700 Klaksvík, í hendi í seinasta lagi 23. august 2004.

**Klaksvíkar Býráð**




# PARTABRØVINI Í P/F HOTEL HAFNIA TIL SØLU

Orsakað av persónligum umstøðum verða partabrøvini í P/F Hotel Hafnia hervið lýst til sølu.

Partafelagið eigur bygningin Hotel Hafnia, sum hevur eina ta bestu adressuna í Havn: á Áarvegnum, í miðbýnum.

Hotellið hevur fýra stjørnur og gott orð á sær, er í góðum standi og væl vitjað, bæði summar- og vetrarhálvuna. Hotellið hevur 57 kømur, øll við baði og toiletti. Av kømurunum eru fýra suitur.

Hotellið hevur fimm veitslu- og fundarhølir, væl hóskilig til skeiðvirksemi. Úr hugnaligu hølunum á 5. og 6. hædd er besta útsýni yvir alla Havnina. Á hotellinum er matstova til 80 gestir. Køkur, kaldur køkur, grovkøkur, uppvaskirúm, frysti- og kølirúm, turrgoymsla og egið vaskarí eru á somu hædd. Fýra hæddir eru við kømurum, har eisini tilhoyrandi goymslur eru til rein seingjaklæðir og annað.

Móttøkan, kundaskrivstovan og sera hugnalig høli, "Lobby"og "Lounge", eru í gøtuhæddini. Eisini eru útleiguhølir í gøtuhæddini, har frisørsalong og ferðaskrivstova hava hildið til í skjótt eitt mannaminni. Niðasta hæddin er undir jørð við verkstaði, telefonrúmi og fleiri goymslurúmum. Hotellið hevur sjálvvirkandi neyðel-skipan.

Umframt Hotel Hafnia eigur partafelagið ein starvsfólkabygning í Brøttubrekku 19 við fýra íbúðum.

Viðmerkjast skal, at P/F Hotel Hafnia tekur sær rætt til at velja millum innkomnu tilboðini ella ongum tilboði at taka av.

Alt samskifti í sambandi við søluspurningin er í trúnaði.

Heygum & Petersen
Bøgøta 16
FO-100 Torshavn
Tlf. 35 17 10 • Fax 35 17 11
teldupostadr. h-p@h-p.fo

W W W . S O S I A L U R I N . F O